Løgtingslóg

um

broyting í løgtingslóg um miðlastuðul (Miðlastuðulslógin)
(Broyting til verkætlanarstuðul)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 35 frá 31. mars 2017 um miðlastuðul (Miðlastuðulslógin) verða gjørdar hesar broytingar:

1. Yvirskriftin yvir § 1 verður broytt til:

"*Nýtsluøki løgtingslógarinnar"*

2. Í § 1, stk. 1 verður orðið "lóg" broytt til: "løgtingslóg"

3. Í § 1, stk. 2 verður "ein árligan" strikað.

4. § 3, stk. 1, nr. 2 verður strikað.
Nr. 3 og 4 verða eftir hetta nr. 2 og 3.

5. Í § 3, stk. 2 og 3 verður "nr. 1-4" broytt til: "nr. 1-3"

6. § 4, stk. 2 og 3 verða orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Av árligu játtanini á fíggjarlógini verða 70% latin verkætlanum, sum leggja seg eftir at gera loftborið ella skrivligt tilfar, sum verður mett at hava journalistiska dygd og samfelagsligt virði. Harumframt verða 30% av árligu játtanini á fíggjarlógini latin sum ein eins lutfalslig upphædd í prosentum av skjalprógvaðum lønarútreiðslum árið fyri umsóknarárið hjá viðkomandi miðli ella miðlasamtaki. Ein miðil ella miðlasamtak kann í mesta lagi fáa 40% av teimum 30% av árligu játtanini á fíggjarlógini, ið er sett av til stuðul við støði í skjalprógvaðum lønarútreiðslum sbrt. 2. pkt.
Stk. 3. Stuðul til verkætlanir sbrt. stk. 2 verður latin til virksemi, ið verður framt í eitt avmarkað tíðarskeið við einum ítøkiligum endamáli og úrsliti. Lønarútreiðslur sbrt. stk. 2 verða gjørdar upp við støði í góðkenda roknskapinum hjá viðkomandi miðli ella miðlasamtaki undanfarna roknskaparár."

7. Í § 4 verður sum stk. 4 sett:
"*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri treytir fyri stuðli."

8. Í § 8 verður aftan á stk. 3 sum nýtt stk. sett:
"*Stk. 4.* Eftir at verkætlan sambært § 4, stk. 2 er liðug, skal viðkomandi miðil lata Miðlastuðulsnevndini roknskap fyri verkætlanina. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um krøv til roknskapin."
Stk. 4 verður eftir hetta stk. 5.

9. Í § 10, stk. 1 verður "§ 8, stk. 4" broytt til: "§ 8, stk. 5".

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2022.

pSamtykt á Løgtingi hin 29. apríl 2021 við 14-0-11 atkvøðum.

formaður

/

/

skrivari

Borið saman við samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 29. apríl 2021

stjóri

lm. nr. 115/2020